# Føroysk uppfinning til 300 skip

**Tríggir føroyskir verkfrøðingar, sum hava gjørt orkusparandi uppfinning, hava undirskrivað samstarvssáttmála við reiðaríið Norden, ið eigur og rekur á leið 300 skip**

ÚTFLUTNINGUR
*Kári Mikkelsen*
*Jón Brian Hvidtfeldt*




*Tríggir føroyskir uppfinnarar hava gjørt samstarvsavtalu við reiðaríið Norden, ið ræður yvir 500 skipum*

Danska reiðaíið Norden hevur ætlanir um at keypa eina føroyska, orkusparandi uppfinning frá trimum føroyskum verkfrøðingum.

Nú er keypssáttmáli undirskrivaður við Norden um føroysku uppfinningina, sum verkfrøðingarnir hava verið tvey ár um at menna.

Hetta er ein skipan, sum sparir skipum nógva olju. GreenSteam, sum skipanin eitur, mátar til dømis aldu og vind og roknar so út, hvat skal gerast fyri at minka um vatnmótstøðuna á skipinum og soleiðis spara olju. Skipanin er sprottin úr eini granskingarætlan, sum byrjaði fyri bert tveimum árum síðani.

Úrslitini av royndum umborð á Smyrli tað seinasta árið hava verið so mikið góð, at danska reiðaríið Norden nú er hugað at keypa skipanina frá føroyska felagnum Decision 3.

Um týdningin sigur Tað eru teir tríggir verkfrøðingarnir Dánjal Jákup Jacobsen, Ólavur Simonsen og Jóhan Petur Petersen, sum hava gjørt GreenSteam. Arbeiði teirra við at menna hesa skipan hevur verið stuðlað av Granskingarráðnum, Vinnuframagrunninum, Amerada Hess og Kleking.

Um týdningin sigur Ólavur Simonsen frá Decision 3, sum er felagið hjá teimum trimum føroyingunum, við Rás2:

– Norden hevur útvegað okkum ein nýbygning, sum helst verður bygdur í Kina, til at gera ta fyrstu skipanina. Hetta er eitt stórt gjøgnumbrot fyri okkum, sigur ein av teimum trimum uppfinnarunum.

Á ráðstevnuni TransAtlantic Climate Conference í Norðurlandahúsinum 7. og 8. apríl verður høvi at hoyra um GreenSteam skipanina og úrslitini av royndunum umborð á Smyrli.

# NSR depil í Suðuroynni tikin í nýtslu

**Hósdagin var almenn móttøka á nýggja NSR deplinum í Vági, ið er liður í at fáa námsfrøðiligu- og sálarfrøðiligu ráðgevingina nærri borgarunum**

RÁÐGEVING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eina tíð hevur verið stáksast inni og uttanfyri eini hús í Vági, tí her skuldi nýggi NSR depilin húsast. Hósdagin var so almenn móttøka og depilin er veruleiki. Hetta er liður í at fáa námsfrøðiligu- og sálarfrøðiligu ráðgevingina nærri brúkarunum, og ein slíkur depil er frammanundan í Eysturoynni.

Nógv fólk stakk inn á gólvið hósdagin, bæði skúlafólk, kommunalpolitikkarar og onnur.

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, hevði fyrstur orðið og fegnaðist um, at enn ein almennur stovnur er uttan fyri Havnina. Hann fegnaðist eisini um, at hendan tænastan nú er nærri borgarunum.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, fegnaðist um hetta felags átak, sum kommunurnar í Suðuroynni hava verið felags um, og tær bera sín part av kostnaðinum. Hon fegnaðist um samstavið og um, at ráðgevingin nú er komin til Suðuroyar.

Hans Eli Dahl, stjóri á Sernámsdeplinum, fegnaðist eisni um nýggja stovnin og at sernámsfrøðin er komin til Suðuroyar. Hann legði eisini dent á, at hann fegnaðist um vælviljan, sum kommunurnar hava víst. Hann minti á, at hetta ber brá av desentralisering, men at við hesum fylgir eisini ábyrgd.

Fimm fólk starvast á NSR Suður, sum depilin eitur. Tveir serlærarar, ein sálarfrøðingur, ein samskipari og eitt skrivstovufólk. Sakaris Dimon er leiðari og samskipari á NSR Suður.

Tað eru kommunurnar í Suðuroynni, sum í samtaki við Mentamálaráðið og Sernámsdepilin hava sett á stovn NSR-suður, ið er ráðgevandi eind í samstarvi við Sernámsdepilin.




*Eina tíð hevur verið stáksast inni og uttanfyri eini hús í Vági, tí her skuldi nýggi NSR depilin húsast. Hósdagin var so almenn móttøka og depilin er veruleiki*

*(Mynd; D. Olsen)*